# 12 góð ár í Psykiatrifelagnum



*Psykiatrifelagið hevur fingið ein góðan formann, sig-ur Sjúrður Norðbúð um eftirfylgjara sín, Kerstin Rasmussen. Her eru tey avmyndað frammanfyri Jákupsstovu har felagið hevur skrivstovu sína*
*Mynd: Kári Niclasen*

**Eftir at hava sitið bæði sum nevndarlimur og sum formaður í Føroya Psykiatrifelag í samfull 12 ár, avgjørdi Sjúrður Norbúð nú at handa stafettina og leiðsluna av felagnum yvir í hendurnar á Kerstin Rasmussen. – Felagið hevur fingið ein góðan formann, segði fráfarandi formaðurin**

FELAG
*Orð&mynd: Snorri Brend*

Seinnapartin í gjár var lítil samkoma í hølunum hjá Psykiatrifelagnum í »Jákupsstovu«, har limir úr felagnum og onnur áhugað vóru samankomin at heiðra fráfarandi formannin og tann nýggja.

Kerstin Rasmussen helt sjálv fyri, at hon hevði nógv at takka Sjúrða fyri.

- Hann hevur verið sera arbeiðssamur, humoristiskur, diplomatiskur og altíð góður í ráðum. Og so er hann ein ørn, tá talan er um samráðingar, legði hon aftrat.

Í nevndini í Psykiatrifelagnum eru umframt Kerstin Rasmussen eisini Marner Tausen, Don Petersen, Sveinbjørn Olsen og Kári Niclasen.

Tiltakslimir eru Guðrið í Bartalsstovu og Sølva Heinesen.

## Í tryggum hondum

Nú Kerstin Rasmussen hevur lagt til brots við nývaldu nevndini, hevur hon sjálv nøkur hjartamál, sum hon ynskir at fremja í framtíðini.

Fyrst og fremst ætlar hon at leggja stóra orku í at samstarva við limirnar í hennara egna felagi, men eisini við millum annað onnur fakfeløg og arbeiðsgevaran.

- Tað er altíð gott at kenna avmarkingar, men ikki minst førleikarnar hjá einum sjálvum, men eisini hjá øðrum. Á henda hátt kunnu vit gagnnýta vitanina hjá hvørjum øðrum, legði hon dent á.

Eitt serligt samstarv hevur verið við Almanna- og Heilsurøktarfelagið, har feløgini samráddust saman og fingu ein sáttmála í hús, sum báðir partar vóru nøgdir við.

Eitt tað fyrsta, ið farið verður í holt við er verkætlanin sum umfatar eina uppskúling av pleygarum til heilsurøktarar. Pleygarar eru ein fakbólkur við fleiri limum, men hvørs útbúgving ikki er til longur.

Sjúrður Norðbúð segði í síni takkarrøðu, at hetta høvdu verið 12 góð ár í nevndini.

- Eg haldi, at Psykiatrifelagið hevur fingið ein góðan formann. Felagið hevur nógvar stórur uppgávur at loysa í framtíðini. Men í hondunum á Kerstin, er felagið í tryggum hondum, legði Sjúrður Norðbúð dent á.

# Kiwanis gáva til Ælabogan

Á stuttari samkomu mikukvøldið lat Kiwanis Tórshavn eina gávu til Ælabogan upp á 30.000 krónur. Ælabogin er orksetur fyri tónleikaáhugaðmenningartarnað.

Gávan var givin í sambandi við, at Ælaborgin fylti 10 ár.



*Annika Højgaard, ein av leiðarunum í Ælaboganum, saman við nevndini í Kiwanis Tórshavn: Sofus Borðoy, Øssur av Steinum, Torkil Skála, Hans J. Michelsen og Símun Hammer*











**Ford Escape** til sølu
*– 4-hjólstrektur luksusjeepur*

**Ford Escape Limited** við 3.0 V6 bensinmotori (200 hk). Skrásettur fyrstu ferð í juni 2007. Hevur einans koyrt 23.000 km.

Bilurin er sera væl útgjørdur og hevur m.a. 4-hjólstrekk, aut. gear, leðursetur, fløguspælara til 6 fløgur, aircondition, el-rútar, el-spegl, el-førarasetur, fjarstýrt centrallás, orig. 16" alu-felgur, fartpilot, tokulyktir og takboylar.

Bilurin er sum nýggjur bæði innan og uttan. Nýprísur: 460.000,-.

**Verður seldur fyri einans kr. 325.000,-**
**Tlf. 211996 ella kho@post.olivant.fo**

Haldið Sosialin

Tekna teg sum haldara nú fyri einans
**495,- um ársfjórðingin**
**Sparið 560,- í mun til leysasølu!**

altíð við tí nýggjasta!

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óposteð. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

Send til: Sosialurin · Boks 76 · FO-110 Tórshavn